TÍÐINDI

Krevur eitt ára revsing

Ákærin segði, at so nógv útgerð var funnin saman við 34 skunkplantum, at roknast mátti við, at ætlanin var at selja

Leo Poulsen

Narkopolitiið fann 34 skunkplantur heima hjá ákærda manninum, og umframt tað vórðu eisini funnin 859 hampfræ.

Av tí at planturnar vóru heystbúnaðar metti ákærin, at tað var forsvarligt at nýta meðaltalið hjá Rættarkemisku Deild upp á 46 gramm fyri hvørja plantu. Hann segði tí, at tær 34 planturnar av skunki svaraðu til 1.564 gramm av hassji.

Tá tað kom til hampfræini vísti Stefan Møller Jørgensen á dómin í danska hægstarætti í 2002, har ein ákærdur varð dømdur fyri roynd at framleiða narkotika.

Tann ákærdi hevði keypt eina rød av fult lógligum oljum, men settar saman kundu oljurnar gerast til narkotina, og tað var maðurin dømdur fyri.

Stefan Møller Jørgensen segði tí, at tað var mest sannlíkt, at ákærdi maðurin ætlaði at brúka hesi hampfræ at seta niður og harvið framleiða skunk.

Út frá einum meðaltali vísti ákærin á, at tey 859 hampfræini kundu væntast at geva 351 honplantur, sum so aftur vildu givið við áðurnevnda meðaltali á 46 gramm hassj fyri hvørja plantu, 16.146 gramm av hassji, ella oman fyri 16 kilo.

Stefan Møller Jørgensen mælti tí til, at revsingin ikki bleiv undir eitt ára revsing. Hann segði, at málið var vorðið heldur gamalt, og tí mátti roknast við, at ákærdi fekk ávísa rabatt, men helt kortini, at eitt ár var rímilig revsing.

Sum heilivág

Verjin, Bjørn á Heygum, var ikki óvæntað ósamdur við ákæran.

Han vísti í fyrsta syfti á, at tann ákærdi roykti hassj sum ein lið í eini heilivágsviðgerð, tí ákærdi hevði ymiskan skavankir, og tað skapti linna hjá honum at roykja hassj.

Síðani vildi Bjørn á Heygum vita, um tað ber til at døma nakran upp á eitt meðaltal.

Hann vísti á, at teir royndu dyrkararnir í Føroyum tosaðu um 10-14 gramm úr hvørjari plantu og í besta føri 20-30 gramm. Kortini sigur meðaltalið hjá Rættarkemiskari Deild 46 gramm.

Hartil vísti verjin á, at THC virði í hvørjari plantu varierar heilt frá niður í 1% og upp í 35%.

- Og tí ber ikki til at tosa um meðalvirði, helt Bjørn á Heygum.

Hann segði, at framleiðslukostnaðurin í sambandi við eina skunkplantagu var so mikið lágur, og tí hava menn lyndi til at gera tær í størra lagi. Men hetta kundi ikki leggjast til grund fyri, at nøgdin var ein ætlan um at selja hassj.

Ákærdi fekk seinasta orðið og hann helt fast við, at talan bert var um egna nýtslu. Hann segði eisini, at hann nýtti hassjið sum heilivág, tí tað gav honum góðan linna.

Bjørn á Heygum mælti til, at revsingin allarhægst gjørdist tveir mánaðir.

Kendi einki til planturnar

Í einum máli, har tveir mans vórðu ákærdir saman, helt ákærin, at eingin kundi siga seg skuldarfrían. Hann mælti tí til hálvtannað árs fongsul til annan og 40-50 dagar til hin ákærda

Leo Poulsen

Eisini í hesum málinum vísti ákærin til innrættingina av plantaguni fyri at vísa á, at talan var um framleiðslu í longri tíð.

Funnar vóru 16 plantur í tí partinum av tvíhúsunum, har annar ákærdi búði, meðan níggju plantur vórðu funnar í hinum partinum av húsunum.

Hesin ákærdi hevði í rættinum sagt, at hann kendi einki til nakrar skunkplantur, tí hann hevði verið úti og siglt í tvær, tríggjar vikur, tá húsini vórðu rannsakað.

Hann helt tí, at tað var hin maðurin, sum hevði sett planturnar inni í hansara parti av húsunum, tí hesin hevði lyklar til húsini og nýtti brúsuna og frystiboksina hjá sær.

Hin ákærdi greiddi frá, at tað var hann, sum hevði sett hesar planturnar inni hjá hinum siglandi vinmanninum, og at tað tí var hansara skuld - hin maðurin var ósekur.

Hesin ákærdi segði eisini, at hansara plantur góvu millum 20 og 30 gramm av hassji fyri hvørja plantu.

Ákærin vísti á, at funnin vórðu eisini 483 hampfræ vórðu funnin, og tað var ákærdi mettur at vilja gera um til skunkplantur. Ákærin helt tað nevniliga vera rættiliga ósannlíkt, at talan var um eitt samlaraobjekt.

Hesinákærdi er áður revsaður fyri at smugla 200 gramm av hassji, og tað gav 40 dagar fongsul.

Ákærin helt ikki, at hin maðurin kundi sleppa undan skuldarskyldu, og at talan var um eitt professionelt vakstrarrúm. Hann mælti tí til 40-50 dagar fongsul.

Visti ikki av

Bjørn á Heygum var eisini verji hjá harðari ákærda manninum, og hann vísti til tað, hann segði í fyrra málinum um meðaltal fyri hassj og meðaltal av THC.

Hann vísti eisini á, at hansara klientur hevði tikið skuldina fyri planturnar inni hjá hinum ákærda á seg.

Hann vísti somuleiðis á, at tað fanst einki prógv yvirhøvur fyri, at ákærdi hevði havt ætlanir um sølu. Har var einki kommunikatiónsprógv um, at ákærdi seldi.

Hann segði eisini, at tað er fult lógligt at eiga hampfræ, og fyri tað um hann hevði havt fræ, var tað einki prógv fyri, at hann hevði ætlað at planta tey.

Julianna Klett var verji hjá hinum ákærda og hon vísti á, at planturnar vórðu plantaðar, meðan klientur hennara var úti og sigldi.



- Eg havi spurt meg fyri og havi fingið at vita, at planturnar vóru í mesta lagi 14 dagar gamlar og tað merkir, at klientur mín ikki var heima, tá tær vórðu plantaðar, segði hon.

Hon segði eisini, at tað tipsið, sum kom, bert gekk upp á hin ákærda, og als ikki hennara klient.

Juliana Klett segði, at hennara klientur var fullkomiliga ósekur og óvitandi um tær níggju planturnar.

Hon kravdi tí ákærda frídømdan.

Krevur hálvtannað árs fongsul

Tað heldur ákærin tað skal kosta einum manni at hava skunkplantagu uppi á loftinum í húsunum, har mamma hansara búði saman við mammu síni og bróðuri. Hinvegin helt hon, at ein treytaður dómur til mammuna var passandi

Leo Poulsen

Tað komu 82 skunkplantur undan kavi, tá narkopolitiið gjørdi eftir einum tipsi og rannsakaði eini hús í høvuðsstaðnum.

Ákærin vildi vera við, at ákærdi hevði havt framleiðslu í longri tíð, soleiðis, sum plantagan var innrættað.

Og fyri at prógva sølu vísti ákærin á tær upphæddir, sum vóru settar inn á konto hjá ákærda.

Ákærdi mótmælti harðliga teirri nøgd, sum ákærin segði, at hvør skunkplanta gav.

Narkopolitiið fann eisini 219 hampfræ, sum ákærdi fyrst segði seg vilja nýta til at seta niður og dyrka skunkplantur av, men síðani broytti frágreiðing og segði, at hann var hugtikin av hampfræi og tí samlaði hesi.

Ákærdi segði, at skunkplantagan var professionelt umgingin og vísti á útluftingina og hvussu rúmið var innrættað

Ákærdi var áður revsaður í rúsevnismálum, og tí kravdi ákærin hálvtannað árs fongsul til hin ákærda.

Hesin var ákærdur saman við mammu síni, og politisturin, sum hevði avhoyrt mammuna, var í rættinum ein annan dag at greiða frá, og sambært honum luktaði húsið av hampi. Tað helt ákærin, at mamman átti at havt lagt til merkis.

Ákærdi vísti til nakrar dómar og mælti síðani til, at tann ákærda varð dømd ein treytaðan dóm.

Ósamd í útrokning

Turid Hentze legði beinanvegin eftir útrokningini hjá ákæruvaldinum, sum sambært teimum gjørdi plantaguna upp til oman fyri tvey kilo. Hon pástóð, at rætta talið var undir eitt kilo.

Hon segði, at tað er ikki rætt at halda seg til meðaltalið hjá Rættarkemisk Deild, tí tað eru konkre-tu málini, tað snýr seg um.

Hon segði, at kanningararbeiðið var ikki gjørt til lítar frá narkopolitinum, tí bara fýra av teimum 82 plantunum vórðu sendar til Danmarkar til kanningar á Rættarkemiskari Deild.

Hon spurdi, um rættarpraksis í Føroyum yvirhøvur er í lagi.

At enda mælti hon til, at revsingin gjørdist tríggjar til fýra mánaðir.

Óla Jákup Kristoffersen segði, at málið við mammuni ongantíð skuldi verið komið so langt sum í rættin.

Tað var í lagi, at hon varð skuldsett, men tá málið kom hartil, átti skuldsetingin at verið slept. Hann helt at tað var týðiligt, at mamman einki visti um plantaguna, og tí átti hon at verða fríkend.

Kann rætturin ikki fríkenna mammuna, eigur revsingi í øðrum lagi at verða útseting av revsing í ett ár, segði Óla Jákup Kristoffursen.